VALGREINAR

Føroyski búskapurin ov lítil og viðbrekin til stóra almenna sektorin

Bjørn Kalsø
valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum

Politiskar telvingar undir samgongusamráðingum kunnu ikki verða avgerandi fyri at seta á stovn nýggj almenn ráð.

Vit hava snøgt sagt ikki ráð til øll almennu ráðini

Tað verður tí neyðugt hjá eini komandi samgongu at eftirmeta almenna bygnaðin, við tí fyri eyga at rationalisera, soleiðis at umsitingin kemur á eitt lægri kostnaðarstøði.

Seinastu fimm árini eru almennu útreiðslur landskassans vaksnar við einari heilari milliard. Ein ræðandi vøkstur, sum tíverri heldur ikki gevur borgarunum betri tænastur, ið svara til ógvusliga vøksturin.

Føroyski búskapurin er lítil og viðbrekin. Tá sæð verður burtur frá ríkisveitingini, eru fiskivinnan og alivinnan mest sum einastu vinnugreinar, vit hava at seta okkara álit á, tá talan er um at vinna pening til landið. Pening, sum má til fyri at tryggja okkum, ið búleikast á klettunum rímilig kor. Kor sum fólk í øllum framkomnum tjóðum ynskja at hava.

Tað er tí umráðandi í Føroyum eins og alla aðrastaðni at hava ábyrgdarfullar politikara, sum tora at halda eftir, ikki minst í góðum tíðum. Brúk er fyri politikarum, sum ikki gloyma, at tað er mark fyri, hvussu stóran almennan sektor føroyski skattgjaldarin orkar at gjalda. Søgan hevur jú langt síðan lært okkum, at tiðirnar kunnu ikki bara batna. Tað koma tiðir við stagnatión ella afturgongd. Tí kann almenna umsitingin ikki vaksa uttan mál og mið. Tænastan í umsitingini má tí tryggjast við rationaliseringum og prioriteringum, heldur enn, sum nú, við ótálmaðum vøkstri.

Tað er t.d. hugstoytt, at eitt og fleiri nýggj almenn ráð hava verið stovnað, hvørjaferð nýggj samgonga er skipað seinastu árini. Tað kann t.d. ikki verða rætt at skipa nýggj ráð við bygningum, landsstýrismanni, aðalstjóra og stórari kostnaðarmiklari umsiting, bara fyri at fáa eina politiska kabal at ganga upp. Talan er í slíkum føri eftir míni meting um grovt ábyrgdarloysi. Vit hava stutt sagt ikki ráð til øll almennu ráðini. Í einari komandi samgongu skal umsitingina tí eftir-metast, við tí fyri eyga at rationalisera, effektivisera og harvið minka um almennu útreiðslur landskassans.

Eitt sambandsumboð í Norðoyggjum fer tó at tryggja, at tann peningur, sum hóast alt er neyð-ugur at brúka, verður spjæddur eisini úti um landið, soleiðis at útjaðarin í landinum ikki hvørvur. Ein sterkur útjaðari er við til at varðveita bústaðarmynstrið og sparir sosialu skipanini nógvar trupuleikar og pengar.

Veljið tí Sambandsflokkin 20. januar.

Serviðgerð uttanlands

Bill Justinussen
landsstýrismaður og valevni Miðfloksins í Eysturoy
Bill.teletech.fo

Tá tað javnan hevur verið spurt um viðurskiftini viðvíkjandi játtanini til serviðgerð uttanlands, skal eg her greiða frá umsitingini av hesi játtan so stutt, sum tað ber til at gera tað.

Á hvørjum ári í apríl mánaða skulu landsstýrismenninir bera síni fyrstu tøl út til figgjarmálaráðið til figgjarlógina fyri næsta ár. Sera trupult er at meta um kontuna serviðgerð uttanlands. Tá eg sum nýggjur landsstýrismaður í 2002 beinanvegin skuldi undir at gera figgjarlóg fyri 2003, var trupult longu tá at meta um, hvussu stór nýtslan á serviðgerð uttanlands fór at gerast. Eg setti mær beinanvegin sum mál, at hendan játtan á figgjarlógini, sum í roynd og veru er ein lógarbundin játtan, tí yvirlæknarnir hava heimildirnar at ávísa og áleggja landskassanum útreiðslurnar, skuldi fáa eina umsiting. Tað hevði hon sum so ikki havt. Avtalað varð tí, at ein persónur skuldi setast burturav at hava eyga við hesi játtan, tí talan er jú um skattborgarans pening, og landsstýrismaðurin skal til eina og hvørja tíð tryggja sær, at hesin peningur verður nýttur á mest forsvarligan hátt. Av tí at figgjarnevndin gjørdi fleiri mistøk í samband við allar sínar broytingar við ársenda 2002, fingu vit ikki sett hendan samskiparan í starv fyrrenn nakrar mánaðir inn í 2003. Alt fyrra hálvár 2003 sá út til, at játtanin á 70 mió kr. fór at samsvara væl við ársnýtsluna. Men so vísti tað seg, at nýtslan í seinnu helvt av 2003 gjørdist størri, enn vit høvdu roknað við, og tí varð neyðugt at biðja tingið um eykajáttan á 13 mió.

Eisini eftirlýstu yvirlæknarnir eina meiri neyva kunngerð, sum greiðari ávísti, hvussu skipanin við avvarðandi fylgjarum skuldi umsitast. Arbeiðið við at broyta kunngerðina fór í gongd á heysti 2002 og var ikki liðugt fyrrenn á heysti 2003. Kunngerðin er gjørd í tøttum samstarvi við yvirlæknarnar og sjúkrahúsráðini umframt aðrar partar. Læknarnir ynskja sær als ikki uppgávuna at nokta og játta avvarðandi møguleikan at vera fylgjarar, men enn er ein skipan við visitatiónsnevnd ikki til. Hendan má skipast við lóg, og hetta lógarupp-skotið er gjørt. Tá hendan lógin er samtykt, fer at bera til hjá eini visitatiónsnevnd at samskipa økið munandi betri saman við samskiparanum í Familju- og heilsumálaráðnum. Ein broyting til tað betra í kunngerðini, at aldursmarkið fyri, nær børn altið kunnu fáa fylgjara við, er hækkað úr 16 í 18 ár. Aðrar broytingar eiga eisini at gerast í kunngerðini, eitt nú at bæði foreldrini altíð skulu við, tá børnini eru undir ein ávísan aldur ella tá eitt nú ein kvinna má niður til Danmarkar at eiga. Hinvegin er tað ongin meining í, at vaksin fólk, sum von eru at ferðast kring heimin, skulu hava fylgjarar við, tá talan ikki er um lívshóttandi sjúku. Hesum hevur verið ov nógv av, og tað kunnu vit ikki bjóða føroyska skattborgaranum.

Familju- og heilsumálaráðið hevur í sambandi við serviðgerðina uttanlands gjørt nógvar broytingar í mannagongdunum. Nakrar av hesum verða nevndar her:

- Nú fáa yvirlæknarnir regluliga at vita, hvørjar viðgerðir, teirra sjúklingar hava fingið, og eisini innlit í figgjarliga partin
- Nú galda kautiónirnar ikki í eitt ár, men eitt hálvt ár
- Nú verða allir sjúklingar innkallaðir gjøgnum føroyska sjúkrahúsverkið og ikki beinleiðis frá danska sjúkrahúsinum
- Eftirviðgerðir fara í framtíðini í størri mun at vera meiri framdar í Føroyum. Tað er tyngjandi fyri familjulív og gerandisdagin annars regluliga at skula ferðast til fremmant land til kanningar. Nærum helvtin av øllum viðgerðum er eftirviðgerð
- Nýggj avtala er gjørd við Rigshospitalet, sum tryggjar, at tey í størri mun taka hædd fyri føroyskum sjúklingum, sum koma langvegis frá og ikki altíð hava so lætt við at samskifta á øðrum máli
- Um viðgerðin kann gerast í Føroyum, skal sjúklingurin verða viðgjørdur her heldur enn í Danmark
- Planlagdar viðgerðir skulu í størri mun samskipast, har møguligt er at fáa lækna til Føroya heldur enn, at sjúklingarnir fara uttanlands til viðgerðar
- Kannað verður, hvørjar viðgerðir kunnu fáast í Íslandi
- Føroyingar hava lagt upp til samstarv í útnorði um ávísar viðgerðir

Ongin, sum hevur tørv á neyðugari viðgerð uttanlands, hevur fingið hesa noktaða. Tað havi eg sum landsstýrismaður ikki heimild til. Heimildina at nokta hevur yvirlæknin, hendan heimildin er honum givin við løgtingslóg. Landsstýrismaðurin hevur tann ivasama heiður at hava ábyrgdina fyri, at játtanin á figgjarlógini heldur. Tá tað hevur sæð út til, at játtanin ikki fór at halda, vendi eg mær til yvirlæknarnar og spurdi, um onkrar viðgerðir kundu útsetast. Hetta skuldi bert vera, um tað læknafakliga kundi lata seg gera. Talan er um nøkur fá fólk, og í flestu førum hevur als ongin trupulleiki staðist av hesum.

Í 2003 vórðu 1.579 fólk viðgjørd uttanlands. Hetta er tað mesta nakrantíð, og talið er í støðugum vøkstri. Tó er miðalkostnaðurin pr. sjúkling minkaður í mun til árið fyri, og tað kann vera orsakað av teimum broyttu mannagongdunum. Í so fall hevur skattborgarin fingið meiri burturúr hvørji játtaðari krónu. Um eini 2 ár verður játtanin til serviðgerð uttanlands omanfyri 100 mió, um ikki okkurt munagott verður gjørt fyri at bjóða viðgerðirnar í Føroyum, sum eg meti má vera aðalmálið. Nakrar viðgerðir kunnu ongantíð verða gjørdar í Føroyum, tí landið er ov lítið, og ongin serlækni, sum fær ov fáar viðgerðir innanfyri sítt øki, vil arbeiða í Føroyum. Læknans dugnaskapur er nógv tengdur at teirri rutinu, hann dagliga fær í sínum starvi, og hesa rutinu fær hann ikki í Føroyum innan nøkur øki.

Onki er, sum bendir á, at færri sjúklingar enn tey, sum ynskja tað, hava fingið viðgerð uttanlands. Hetta hevur Javnaðarflokkurin annars ferð eftir ferð fort fram, men hetta passar ikki. Vøksturin er rættiliga linierur, hóast kostnaðurin kann vera sera ymiskur frá eini viðgerð til aðra.

Miðflokkurin vil altíð virka fyri, at øll, sum eru sjúk, fáa ta viðgerð, tey hava rætt til. Men vit vilja samstundis reka ein ábyrgdarfullan figgjar-politikk, tí øll eru vit skattborgarar, eisini tey, sum gerast sjúk. Viðvíkjandi útreiðslum til heilsumál eiga vit altíð at vera vakin, tí heilivágsídnaðurin er ein av heimsins størstu ídnaðum og sera nógv áhugamál eru galdandi.

Miðflokkurin segði nei til at blokkurin skuldi skerjast við kr. 367 milliónum (2)

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Í seinastu grein míni hesum viðvíkjandi nevndi eg, at Miðflokkurin var ímóti at blokkurin skuldi skerjast, og Miðflokkurin stemmaði eisini ímóti hesum í Løgtinginum.

Ongin kundi siga, hvørjar avleiðingar hetta fór at hava, enn minni hvør vinna skuldi tjena hesar pengar inn í landskassan á annan hátt aftur.

Tí vildi Miðflokkurin hava at hetta bleiv sent út til Føroya fólk til fólkaatkvøðu, og legði tí uppskot fram hesum viðvíkjandi, so at fólki kundi fáa loyvi at tala í so tíðandi máli sum hesum, men nei meirilutið fekst ikki í Løgtinginum fyri hesum, sum Miðflokkurin nú tosaði um. Og vit kenna avleiðingarnar av, at ikki bleiv lurtað eftir uppskotinum hjá Miðflokkinum.

Vel Miðflokkin sum tína rødd á Løgtingi. Borgan fyri vælferð og trivnaði.

VALGREINAR

Stýring og tryggleiki

Gunnvá Mortensen
valevni Javnaðarfloksins í Norstreymoy

Vit hava tað so mikið gott í Føroyum, samanborðið við nógv onnur, at tað ofta verður torført at velja, hvør politiska leið er tann rætta. Vallyftini líkjast alsamt meira, nærri vit koma at valdegnum.

Tað, vit hava størstan tørv á, kann, eftir mínum tykki, lýsast í tveimum – 1. Okkum tørvar stýring! 2. Okkum tørvar tryggleika!

Myndugleikarnir høvdu onga ætlan og onga støðu til teir búskaparligu trupulleikarnar, sum hótta samfelagið. Teir søgdu – tað, sum ikki kann standa, má falla. Hetta er tó ein erlig og greið støða, men hetta er ikki marknaðarbúskapur í vanligari merking – Hetta er ábyrgdarloysi!

Sum tað hevur verið og er framvegis – er tað óforsvarligt at lata útlendskar íleggjarar, fritt, seta pening í, eitt nú alivinnuna – fyrst má stýring fáast á okkara tilfeingi. Javnaðarflokkurin hevur, sum einasti flokkur, eitt ítøkiligt boð uppá, hvussu vit loysa henda trupulleika – nevniliga Fiskidagamarknaðurin – hesin leggur upp til stýring á økinum, og tað má vera fyrsta stigið. Við hesum er ikki sagt, at trupulleikarnir í alivinnuni eru loystir, men uttan stýring er vónleyst at arbeiða víðari.

Slíkur fiskidagamarknaður skal – umframt at steðga spekulatónini við at selja ali og fiskiloyvi – eisini kunna geva eitt avkast, sum kemur okkum øllum til góðar. Talan er um eina radikala broyting á tí vinnuliga økinum í Føroyum, um vit samanbera við støðuna ídag. Harafturat er neyðugt við menning av nýggjum vinnum, soleiðis at vit altíð eru tilreiðar við nøkrum nýggjum – skuldi onkur vinna gingið illani.

Viðvíkjandi teimum mest grundleggjandi málunum, eiga vit at seta okkum langtíðar mál, sum ein breiður meiriluti kann taka undir við – tað er ikki gott nokk, at byrja av nýggjum hvørja ferð, eitt nýtt stýri kemur til. Hugsa vit um millumlandaavtalur, ber væl til at seta sær mál nógv ár fram í tíðina – hetta má kunna lata seg gera í okkara stýri. Her hugsi eg serliga um mál sum ríkisrættarligu støðuna, umhvørvið, fólkaheilsuna o.t. Hóast breiðar semjur um nøkur høvuðsmál, fer samfelagið altíð at verða merkt av teimum, ið sita við landsins leiðslu, men endamálið má verða, at skapa tryggleika um tey mest grundleggjandi málini.

Javnaðarflokkurin arbeiðir fyri javnstøðu og virðir frælsið hjá tí einstaka.

Javnaðarflokkurin er framvegis fremstur tá tað snýr seg um nýhugsan.

Javnaðarflokkurin er veruliga nakað fyri seg.

Eg fari tí at heita á teg, um at atkvøða fyri stýring og tryggleika – vel lista C tann 20. januar!

Trollemmavirkið í Vági

Henrik Old
løgtingsmaður og valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Eitt frálíkt dømi um, at ein maður brýtur upp úr nýggjum og leggur sítt virksemi í útjaðaranum er trollemmavirkið í Vági.

Stóð eitt tílíkt virki í einum ES landi, hevði tað fingið sersømdir fyrstu árini fyri at lætta um, so at gongd kom á. Stóð hetta virki í útjaðaranum í einum ES landi, hevði tað fingið uppaftur betri treytir.

Í Føroyum er øvugt, eingin ígongdsetara stuðul, ongar sersømdir sum útjaðaraøki. Men harafturímóti fær eitt tílíkt virki í Føroyum hækkandi fraktprísir, sum eitt tílíkt virki liður nógv undir í og við, at tilfarið er serliga tungt, og sera dýrt er at flyta tað lidna produktið av aftur Suðuroynni.

Tað er so langt ímillum, at tað eydnast hjá einum føroyingi at uppfinna eitt produkt, sum fer alla verðina runt. Eitt slíkt virki skuldi fingið sersømdir tey fyrstu fleiri árini, til tað fekk høvdið fyri seg. Tíverri er so tað øvugta hent. Eingin ígongdsetarastuðul og hækkandi fraktprísir.

Vildi fráfarna samgonga vinnuni nakað gott, so var fyri langari tíð síðani sersømdir ástettar fyri nýtt virksemi í útjaðaranum, og ikki tað øvugta.

Avbjóðingar fyri framman

Andrias Petersen
løgtingsmaður og valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy

Eitt komandi løgting kemur at standa yvir fyri stórum avbjóðingum. Nýggjasta metingin um búskapargongdina frá Fíggjarmálaráðnum vísur, at roknast má við eini afturgongd í búskapinum í 2004 uppá 2%. Hetta samanhildið við eina væntaða framgongd uppá 3% í september 2003, tá figgjarlógin varð løgd fram, er eitt **álvarsligt** signal til komandi løgting.

Tað er lovað og tosað nógv í hesum valstríði, og soleiðis skal tað sjálvandi verða, tí politikkur snýr seg um, hvørjar framtíðarhugsanir ein hevur, og hvørji ynskir ein hevur um framtíðarsamfelagið. Men veruleikin eigur ikki at gloymast, og tann veruleikin føroyska samfelagið stendur yvir fyri nú, kemur at krevja nógv av tí komandi løgtinginum.

Tað, sum hevur verið ov lítið av í føroyskum politikki, eru breiðar semjur um politisk stórmál, ið øll vita, eiga at takast.

Tjóðskaparstríðið er eitt gott dømi um hetta.

Alt ella einki og so endaði málið í ruðuleika og ongum.

Eg síggi fyri mær breiðar semjur um:

- endurskoðan av fiskivinnulóggávuni
- eina breiða samskipaða, førleikagevandi miðnámsútbúgving
- samskipan av okkara sjúkrahúsverki, tá Norðoyðartunnilin opnar
- umskipan og effektivisering av miðfyrisitigini
- dagføring av civilrættarliga lógarverkinum
- nýskipan av eftirlønum

fyri at taka dømir úr rúgvuni, sum komandi løging eigur og skal taka støðu til.

Hetta arbeiðið verður bert gjørt skilagott, um tað verður ein breið politisk semja millum fleiri stórar flokkar.

Javnaðarflokkurin vil gera sítt til, at úrslit verða rokkin.

Miðflokkurin ætlanir um at niðurleggja Suðuroyar og Klaksvíkar Sjúkrahús

Sverre Midjord
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

ein leiðsla fyri øll trý sjúkrahúsini.

Í valgrein í Sosialinum hósdagin 15. januar 2004, skrivar landsstýrismaðurin hjá Miðflokkinum, at hesin hevur ætlanir um at fáa í lag betri samstarv millum sjúkrahúsini, og vísir hann á at besta loysnin vil verða,

Uttan beinleiðis at nevna hetta, men ístaðin at brúka orð sum funktónsberandi eindir, so er uttan iva ætlan hansara tann sama sum var í 1993, við at seta eina visitatiónsnevnd at avgera hvørjar skurðviðgerðir skulu gerast í Klaksvík og á Tvøroyri, og at hetta skal gerast av einum av yvirlæknunum á Landssjúkrahúsinum.

Í eini av valsendingunum í útvarpinum hoyrdi eg ein av yvirlæknunum á Klaksvíkar Sjúkrahús, har hesin kom inn á tað sama sum Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús áður hava fört fram, tað at hjálpa Landssjúkrahúsinum við teirri bíðilistum, við at flyta tær smærri skurðviðgerðirnar til hesi bæði sjúkrahúsini.

Í staðin fyri at leggjast eftir teimum báðu smærri sjúkrahúsunum, kann ein so spyrja, hví gav sami landsstýrismaður so ikki ordra til, at hesir sjúklingarnir, ið skulu bíða upp til eitt ár eftir at verða viðgjørdir, fingu tilboð um viðgerð á hinum báðu sjúkrahúsunum? Ella var hetta ætlanin hjá fyrrverandi samgongu, at hesi skuldi niðurleggjast???

Til Miðflokkin og undanfarnu samgongu kann eg upplýsa, at hetta hevur verið roynt áður, og var eg tá sjálvur í stýrinum fyri Suðuroyar Sjúkrahús, vit megnaðu tá at seta ein stoppara fyri hesum, og verður tað mítt fremsta mál, um eg verið valdur, at støðga hesum einaferð enn.

Góð umsiting kostar

Klæmint Olsen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy

Ein av teimum heilt stóru "flosklunum" til hetta val er, at landsins umsiting skal rationaliserast. Fleiri flokkar hava tikið málið upp í síni valskrá. Í valgreinum og valsendingum ljóðar herrópið: "Umsitingin hjá tí almenna er vorðin ov stór". Mín fatan er tó, at skulu Føroyar stýrast á skilagóðan hátt, mugu vit gjalda tað, sum ein góð umsiting kostar. Punktum!

Sjálvsagt eiga vit at skipa umsitingina, so hon virkar sum frægast. Tað er alt í lagi við tillagingum, umskipanum o.s.fr., um tað tænar einum endamáli. At niðurleggja okkurt aðalráð, at samanleggja okkurt virkisøki, jú tað ljóðar alt rætt og rímuligt. Men í veruleikanum tosa vit um dropar í havinum. Harafturat kemur, at alt ov knappliga broytingar skjótt kunnu vísa seg at vera vanlukkuligar. Tað tekur tíð at byggja upp eina góða umsiting.

Manga skoluna hevur Finn Norman Christensen fingið oman yvir sín syndiga kropp. Hesin danski serfrøðingurin í umsiting var jú settur at leiðbeina landsstýrið. Tað løgna er tó, at teir, sum vóru harðast ímóti, hava sitið við stýrisvøl farnu árini - uttan at stórvegis broytingar eru framdar. So ráðini frá Norman munnu ikki hava verið heilt av leið kortini.

Fari annars at taka hattin av fyri fráfarandi løgmanni Annfinni Kallsberg, tí hann í valsending Fólkafloksins í sjónvarpinum vardi, at umsitingin var vaksin farnu árini. Kanska og vónandi eru vit komin á mál, so vit í dag hava eina umsiting, sum kann fáast at rigga.

Sum lítið land mugu vit í Føroyum liva við, at umsitingin ikki kann vera so finmeskað, sum hon er í øðrum londum. Men vit kunnu ikki liva við, at umsitingin er merkt av tilvild og lógloysi. Tí mugu vit gjalda tað, sum ein góð umsiting kostar.

Sjálvstýrisflokkurin vil trygd og trivnað fyri alt Føroya fólk.